gult18 cyan18 magenta18 svart18



KÍ-NSÍ 2-1 (0-1)

# Klaksvíkingar eru í sjeynda himli

**Enn eina ferð eydnaðist teimum at koma burtur úr eitt sindur kroystari støðu við øllum stigunum**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*

Hóast teir ikki megnaðu meiri enn 1–1 á heimavølli í fyrru semifinaluni ímóti NSÍ næstsíðsta sunnudag, so var fótbóltslagið í Klaksvík gott í síðstu viku. Tey trý stigini í Vági lívgaðu nógv. Og í hvussu so er fram til hósdagin, Kristi himmalferðardag, verður lagið í Klaksvík óført.

Sunnudagin høvdu teir annan sunnudagin á rað vitjan av NSÍ, og aftur hesa ferð eydnaðist tað KÍ, sum í døgunum undan dýra biðjudegi varð sagt at vera í svárari kreppu, at fara av vøllinum við øllum stigunum.

Í fjør søgdu klaksvíkingar fleiri ferðir, at teir høvdu ikki marginalirnar við sær. Eftir dystin í Vági søgdu teir tað mótsatta, og eftir næstu av trimum hólmgongum ímóti NSÍ í tólv dagar, verður sagt úr Klaksvík, at tað væl kundi havt farið báðar vegir.

## Sørir fyrra umfarið

NSÍ var frammanfyri, tá tað var hálvleikt í Klaksvík. Hetta var triði heimadysturin hjá KÍ í landskappingini, og hetta var triðja ferðin, at teir fóru at hvíla seg, meðan mótstøðumenninir vóru omaná.

Bæði liðini vóru eitt sindur umskipað, síðani tey møttust sunnudagin frammanundan. Allan Joensen hjá KÍ var á miðvallarplássinum ytst í vinstru, meðan unglingaspælarin Símun Joensen hevði fingið sentrala leiklutin. Í 3–4–3 spælskipanini vóru Eyðun Klakstein, Alexander Djordjevic og Eyðun Klakstein í álopinum.

Hjá NSÍ var Sjúrður Jacobsen á sentrala miðvøllinum, meðan Jónstein Petersen var á vongverjanum í vinstru. Dánial Hansen, sum higartil í landskappingini hevði verið á miðvøllinum, var hesa ferð í álopinum.

Christian Høgni Jacobsen var ikki førur fyri at spæla. Ætlanin var – sum tað varð sagt í leygardagsblaðnum – at nýggi skotin ikki skuldi spæla við, men skaðarnir høvdu við sær, at Martin Glancy slapp at royna seg.

Tætti og ikki serliga høgi fremmanda maðurin vísti, at hann kann gerast fongur hjá NSÍ. Hann dugdi væl við bóltinum, hann var skjótur, hevði eyga fyri spælinum, og hann hevði góðar skotfintur. Onkra ferðina var hann í góðari støðu, men honum eydnaðist ikki at fáa mál. Men tað var heilt tætt við onkra ferðina.

Hóast klaksvíkingar einki mál fingu í 1. hálvleiki, so vóru teir betri við fyrru trý korterini, enn teir vóru eftir steðgin.

Einasta málið í 1. hálvleiki fekk NSÍ. Ian Højgaard gjørdi seg til at lyfta fríspark í brotsteigin. Hann bíðaði inntil stórstunandi liðformaðurin, Djóni N. Joensen, var komin í KÍ brotsteigin. Eingin KÍ spælari tóktist kenna ábyrgd fyri honum, og so stútaði Djóni sera væl í kassan aftanfyri Meinhard Joensen.

Fleiri aðrir møguleikar vóru í fyrra umfarinum. Dánial Hansen hjá NSÍ gjørdist púra leysur, tá KÍ málverjin og Jan Andreasen misskiltu hvønn annan, men KÍ málverjin blokeraði skotroyndini. Hjá KÍ var Alexander Djordjevic leysur, men royndin fór framvið málverja og málinum.



*Klaksvíkingar otaðu seg sunnudagin upp um NSÍ. Bæði á vøllinum og á stigatalvuni*

Brotssparkið avgerandi

Seinna umfarið tóktust teir á heimaliðnum ikki at hava so gott tamarhald á uppspælinum. NSÍ hevði fatur á langa endanum, og tað kann væl hugsast, at teir høvdu megnað at gjørt sær dælt av skjótum mótálopum, um støðan leingi hevði verið 0–1, og teir á heimaliðnum harvið høvdu verið noyddir at sleppa meiri í verjuni fyri at leggja størri dent á álopið.

So var tað, at KÍ fekk brotsspark. Allan Joensen lyfti frísparksbólt upp um NSÍ manngarðin, Hjalgrím Elttør lá flatur, dómarin bríkslaði, øði kom í NSÍ grindina, Jens Martin Knudsen sá gula kortið, Harley Bertholdsen helt seg burtur frá bóltinum!, og Alexander Djordjevic sendi flatt undir NSÍ málverjan.

Leiðslumálið setti ferð í klaksvíkingarnar, og Jan Andreasen, aftasti verjuskansin og mest sannførandi spælarin hjá KÍ, var høvuðsmaður fyri sigursmálinum. Hann fór framvið í vinstru og legði í brotsteigin. Alexander Djordjevic tamdi, og Erling Fles hevði síðsta fótin á. Harvið gjørdist ungi maðurin, sum eftir steðgin hevði avloyst Eyðun Klakstein, men sum ikki hevði verið serliga eyðsýndur, stóran hetjan hjá heimaliðnum.

NSÍ trýsti nógv síðstu løtuna. Sonni L. Petersen, Brynjolvur Nielsen og Áki L. Hansen komu inn, og hesin síðsti var tvær ferðir tætt við. Seinnu ferðina bjargaði Jan Andreasen á strikuni, og harvið var greitt, at øll stigini vóru eftir í Klaksvík.

### KÍ-NSÍ 2-1 (0-1)

0-1: Djóni N. Joensen 37
1-1: Aleksander Djordjevic (br.) 60
2-1: Erling Fles 82

Dómari: Eiler Rasmussen (Skáli)

KÍ: Meinhard Joensen – Andrass Jacobsen, Jan Andreasen, Niclas Niclassen – Harley Bertholdsen, Jan Joensen, Símun Joensen, Allan Joensen – Hjalgrím Elttør, Alexander Djordjevic, Eyðun Klakstein

NSÍ: Jens Martin Knudsen – Arnfinn Langgaard, Kári Hansen, Djóni N. Joensen, Jónstein Petersen – Gert Langgaard, Ian Højgaard, Sjúrður Jacobsen, Eddie Mikkelsen – Martin Glancy, Dánial Hansen




gult19 cyan19 magenta19 svart19



HB-LÍF 4-2 (1-1)

# Ferð á HB

**Leirvíkingar taptu fyri fyrstu ferð í ár, tá teir leygardagin vitjaðu í Gundadali**

2. DEILD
*Jákup Mørk*

Tað var líka sum eingin, ið hevði roknað við tí heilt stóra frá leirvíkingum hetta kappingarárið. Liðið taldist í fjør millum veikastu liðini í deildini, og upp- og niðurflytingardystir skuldu til, áðrenn sætið í deildini varð tryggjað.

Hetta kappingarárið hevur hylnast munandi betri í so máta. Undan dystinum leygardagin høvdu teir ikki roynt at tapt, og móti einum HB liðið, sum ikki hevur víst tað stóra, kundi tí kanska roknast við, at talan eisini fór at gerast um stig her.

## Rótut

Fyrstu løtuna av dystinum var tó ikki nógv, sum bendi á, at hetta skuldi gerast dagurin hjá LÍF. Spælið frá báðum pørtum var rótut, men teir flestu møguleikarnir, sum vóru, hevði HB kortini.

Tað eydnaðist eisini gestunum at koma á odda, tá leikandi venjarin, Sámal Erik Hentze, sendi eitt skot móti málinum, og leingi var eisini líkt til, at hetta skuldi gerast hálvleiksstøðan.

LÍF fekk tó brádliga javnað, tá eitt langt útspark frá LÍF-málverjanum, endaði við, at Jonhard Høgnesen mundi sloppið leysur. Vandin var somikið stórur, at Eyðfinn Fjalsbak ikki sá sær annan møguleika enn at fella leirvíkingin, og eftirfylgjandi brotssparkið setti Tomek Resel trygt í netið.

## HB avgjørdi alt

Í seinna hálvleiki varð tó skjótt greitt, at HB nú hevði sett sær meira fyri. Teir fingu skjótt tak á spælinum, men tað skuldi ein deyðbóltur til, áðrenn mál kom. Eitt fríspark varð sent úr vinstru síðu, og tá bólturin kom niður við nærmaru stong, hevði Johan Lützen runnið seg leysan, so hann kundi prika bóltin inn.

Nakað seinni var aftur mál. Rangstøðufellan hjá KÍF kiksaði, og tá Eyðfinn Fjalsbak gjørdist leysur, rullaði hann tvørtur um til Eyðun Samuelsen, sum setti bóltin í netið. Eyðun stóð sjálvur faddur til fjórða málið, tá hann legði fríspark inn til Jóannes Færø, sum stútaði inn, og so munaði tað lítið, at Mirek Gill minkaði um munin við einum góðum skoti.

Við sigrinum er nú líkt til, at HB fer at blanda seg í oddin. LÍF misti hinvegin eitt fet í stríðnum, men sum úrslitini í deildini hava verið higartil, tykist kappingin at gerast sera jøvn, og tí kann alt síggja øðrvísi út hjá leirvíkingunum um eina viku.

### HB-LÍF 4-2 (1-1)

1-0: Sámal Erik Hentze
1-1: Tomek Resel
2-1: Johan Lützen
3-1: Eyðun Samuelsen
4-1: Jóannes Færø
4-2: Mirek Gill

# Jens Martin sá reytt í Klaksvík

**Á 24 ára føðingardegi sínum kom nýggi dómarin í bestu deildini rættuliga í andglettin, tá hann bríkslaði fyri brotssparki til heimaliðið**

Eiler Rasmussen, sum er ættaður av Skála, men sum býr í Havnini, helt 24 ára føðingardag sunnudagin. Einki er at ivast í, at hann altíð fer at minnast aftur á henda føðingardagin.

Í nøkur ár hevur Eiler roynt seg sum fótbóltsdómari. Í fjør dømdi hann í 2. deild, fyrr í vár dømdi hann fleiri dystir í kappingini um løgmanssteypið, og sunnudagin var hann fyri fyrstu ferð 23. maðurin á vøllinum í landskappingardysti í bestu deildini.

Hevði tað ikki verið fyri brotssparkið, sum dómarin í 2. hálvleiki dømdi til KÍ, so hevði dómarin neyvan verið tikin upp á tunguna eftir dystarlok. At eingin leggur dómaran til merkis, plagar at vera gott tekin, og umboð fyri báðar partar í Klaksvík sunnudagin halda, at 24 ára føðingardagsbarnið stóð seg væl.

Men í NSÍ vóru teir alt annað enn fegnir um brotssparkið, sum dómarin dømdi til KÍ.

– Hatta hevði einki við brotsspark at gera. Menn togaðust eitt sindur í brotsteiginum. Tá dómarin bríkslaði, ivaðist eg ikki í, at hann dømdi til okkum. Tá eg sá, at tað var fyri brotssparki, at hann hevði bríkslað, segði eg nøkur borgarlig orð við dómaran, og eg góðtaki, at eg fekk gula kortið fyri tey.

Tað sigur Jens Martin Kundsen, NSÍ málverjin. Eftir dystin fekk hann beinleiðis reytt kort, og tað hevur við sær, at hann ikki fer at verja málið í seinnu hálvfinaluni, sum NSÍ og KÍ skulu spæla í Runavík Kristi himmalferðardag.

Men hví fekk tú beinleiðis reytt kort?

– Eg haldi, at tað var burturvið. Eg segði nøkur orð við hann um brotssparksdómin og um, at hann ikki átti at sloppið at dømt aftur. At hann gav mær reyða kortið fyri tað, var ov erkvisið av honum, heldur Jens Martin Knudsen, sum eftir trý ár í útlegd ikki sigur seg kenna nýggja dómaraættarliðið so væl:

– Tað ber kanska eina serliga støðu við sær, at teir, sum fyrr hava fingið autograf frá okkum, nú skulu døma. Eg segði dómaranum aftaná, at hann skuldi ikki ivast í, at eg havi professionella virðing fyri honum, men man má tola eitt sindur. Onkuntíð siga áskoðarar við meg, at okkurt mistak hjá mær hevur verið so ógvusligt, at eg átti ikki at fingið ein nýggjan møguleika.

Men var tað ikki óprofessionelt av so gomlum og royndum spælara sum tær at spæla tær av við kjansin í hálvfinaluni?

– Eg iðri meg, tí eg var rættuliga uppsettur til júst tann dystin, men nú gerst tað ikki við. At tosa og siga nógv – og onkuntíð kanska ov nógv – er ein partur av motivatiónini hjá mær. Soleiðis hevur tað altíð verið, og tað plagar eingin at taka sær tykni av.



*- Tá eg sá, at tað var fyri brotssparki, at hann hevði bríkslað, segði eg nøkur borgarlig orð við dómaran, sigur Jens Martin Knudsen*
*Mynd: SáH*

## Nógv viðgjørd støða

Eiler Rasmussen hevur í viðmerkingini til útvísingina skrivað, at Jens Martin Knudsen varð útvístur, tí hann tosaði sera niðursetandi um dómaran. Hann vil ikki gera fleiri viðmerkingar til tað, men hann vil fegin greiða frá, hví hann bríkslaði fyri brotssparki:

– Á dómarafundum og skeiðum hava vit tosað nógv um at halda, og hvussu tað skal sektast. Eg stóð væl plaseraður, tá Allan Joensen lyfti bóltin upp um verjugarðin. Hjalgrím Elttør ætlaði sær eftir bóltinum, men hann slapp ikki avstað, tí ein NSÍ verjuspælari helt í honum. Tá eg sá tað, var einki annað at gera enn at bríksla fyri brotssparki, og eftir dystin var eg glaður um, at eygleiðarin var samdur við mær í hesum, sigur Eiler Rasmussen.

Onkrir ikki so lítið heitir NSÍ áskoðarar ætlaðu sær at heilsa upp á dómaran eftir dystin. Í tí førinum sást, at skipanin við verju av dómara og hjálpardómarum, sum FSF setti á stovn eftir rokdyst í Klaksvík í fjør, riggaði heilt væl. Fleiri vaktarmenn vóru beinanvegin um svartkløddu menninar, og so komu teir óskalaðir til føðingardagshald. Umframt 24 ára dagin hjá dómaranum, so var ein annar føðingardagur í dómarabólkinum. Ólavur Weihe hevði ikki føðingardag, men tað hevði hin linjudómarin. Páll Augustinussen fylti 30 ár sunnudagin.